# Alitíðindi

Mars 2016

Fiskaaling
Aquaculture Research Station of the Faroes

Fiskaaling pf
FO-430 Hvalvík
Tlf +298 474747
fiskaaling@fiskaaling.fo
www.fiskaaling.fo

## Fiskaaling sum tænastuveitari hjá alivinnuni

Ein støðugt økjandi partur av inntøkuni hjá Fiskaaling seinnu árini hevur verið at veita tænastur til alivinnuna. Eitt nú lúsateljing, táknukanningar og eftirlit við rognkelsum sum amboð til niðurberjing av lús

Seinnu árini hevur Fiskaaling staðið fyri eftirlitinum við lús á alifiski, sum álagt er alivinnuni at gera. At Fiskaaling hevur eftirlitið, er fyri at fáa sama, óvilduga eftirlit allastaðni, óheft at einstaka alaranum.

Álagt er í kunngerðini at telja fisk úr fýra ringum á hvørjum brúki. Men alararnir hava sjálvbodnir gjørt av at havt nógv neyvari eftirlit.

Síðan P. perurans amøban, ið elvir til AGD (Amoebic Gill Disease), varð staðfest í Føroyum á heysti 2013, er arbeiðið hjá lúsateljarunum víðkað til eisini at gera táknukanningar. Hetta verður gjørt fyri at kunna staðfesta møgulig útbrot av AGD so tíðliga sum gjørligt. Hetta hevur alstóran týdning í sambandi við viðgerð av sjúkuni.

Í 2015 hevur Fiskaaling lagt seg eftir at bjóða tænastur innan rognkelsiøkið sum heild, Hetta verður mett sum týðandi framtíðar liður í niðurberjingini av lús.

Hátturin er umhvørvisliga burðardyggur, men sera nógv er enn at læra. Fiskaaling hevur síðani 2011 staðið fyri verkætlan at fáa eina føroyska framleiðslu av rognkelsum. Í tilgongdini hevur felagið bygt upp vitan um hetta økið. Samanfallið millum stóra tørvin á vitan og royndum um rognkelsi í vinnuni, nýmenningina í Nesvík, og AGD táknusveipingarnar hevur havt við sær skipaða tænastuveiting til vinnuna.

Ein partur av tænastuvirkseminum er smærri mátiverkætlanir á sjónum. Her kunnu nevnast streym- og aldumátingar, mátingar av lúsayngli í sjónum og aðrar lýsingar av aliumhvørvi. Granskingarfarið "Andrias Reinert" er eitt týðandi amboð í hesum arbeiði.



# Fiskaaling verður dagført

Felagið er í støðugari menning, og íløgur verða gjørdar á fleiri mótum. Dagføringar verða gjørdar í Nesvík og við Áir, størri bátur er keyptur, og táttað er í góðsku- og eftirlitsskipaninar

Stigbýtta menningin av Sjódepilnum í Nesvík helt fram í 2015.

Nýtslukapasiteturin er øktur grundað á íløgur í vatnveiting og viðgerð í 2014, og eru nú installatiónir gjørdar, kør sett upp o.a. fyri at styrkja um royndarframleiðsluna av rognkelsum, bæði í startfóðringarhøllini og størru høllini, har fiskurin verður fóðraður upp.

Fiskaaling hevur gjørt íløgu í nýggjan bát, «Andrias Reinert», sum hevur røttu støddina til tær mátingar, fólk hjá Fiskaaling vanliga hava tørv á til granskingarverkætlanir og tænastuuppgávur. Báturin gevur møguleika fyri munandi størri virksemi.

Nýggj tøkni er tikin í nýtslu til rognaskiljing og teljing í sambandi við sølu. Maskinan riggar væl og vil framyvir tryggja betri rognagóðsku eins og eina smidligari arbeiðsgongd.

Fiskaaling hevur sett skjøtul á eitt átak at styrkja um stýrisamboð felagsins innan virkisleiðslu og góðskustýring, framleiðslustýring, vatngóðskustýring og at dagføra KT-kervið.

Stýrisamboðini hava verið neyðug í eina tíð, og er tað eisini greitt krav frá góðskuskoðanarmyndugleikum (ISO og Global Gap), at stýrisskipanir verða meira gjøgnumskygdar og effektivar. Góðskuhandbókin er nú talgild og endurskipað sambært framtíðarmynd felagsins. Danska IPW skipanin er tøkniligi karmurin.

Fish Talk skipanin er sett í verk og kemur í staðin fyri Farm Control, og fevnir nú um alla framleiðsluketuna, frá móttiknum rognum úr Noregi til veitt rogn til vinnuna.

Vatngóðskuloggingar eru sentraliseraðar á skíggja og arbeitt verður við dagføring av sensorum á øllum kritiskum liðum og eindum.

Skjøtul er settur á heildarliga uppstigingarætlan fyri vatnveitingarkervið og kritisku linjuna í virðisketuni við støði í fløskuhálsum, váðametingum og málum um veitingargóðsku. Felagið fer undir at seta langtíðarmál og at staðfesta leiklutin í hesum sambandi. Talan er um eina sokallaða strategiprosess.

Góðskustýringin hjá P/F Fiskaaling er góðkend eftir altjóða standardinum ISO9001. Tað er Det Norske Veritas, sum hevur sertifiserað felagið. Góðskustýringin er ein leiðsluskipan fyri stýring av framleiðslu og tilgongdum, og hon umfatar politikk, mannagongdir, vegleiðingar og oyðubløð fyri alt virksemið á Fiskaaling. Áherðsla er løgd á góða verkætlanarstýring innan gransking og menning og á málstýring, sporføri og lívfrøðiliga trygd innan lívfiskaarbeiði, rogna- og yngulframleiðslu.

Útyvir ISO góðkenningina hava vit eisini Global GAP góðkenning. Hendan skal endurnýggjast á hvørjum ári.









# Nýggj inntøka bøtti væl um ársúrslitið

Nýhugsan eftir ein heldur lakan árroknskap hjá Fiskaaling fyri 2014 var við til at bøta munandi um tølini í roknskapinum fyri 2015. Søla av frásorteraðum fiski, sum frammanundan hevur verið fyribeindur, gav felagnum ein eykavinning upp á eina slaka hálva millión krónur

Undanfarin ár hevur eitt nú frásorteraður geldfiskur verið fyribeindur. Men í farna ári varð gjørd ein roynd í samstarvi við Bakkafrost at fáa selt hendan fiskin. Talan var um 18 tons.

Royndin eydnaðist so mikið væl, at hesin fiskurin gjørdist ein inntøka, sum veruliga sást aftur í roknskapinum hjá felagnum, hóast prísurin, sum vera man, ikki var tann sami, sum á øðrum fiski á marknaðinum. Ætlanir eru nú eisini at gagnnýta sjálvan strúkifiskin.

Umframt at troyta hendan nýggja inntøkumøguleikan, er framleiðslan av rognum og yngli á Fiskaaling batnað munandi í mun til árið frammanundan.

Í fjør gekk ikki eftir ætlan við framleiðslu undan fiskinum frá SalmoBreed. Fiskaaling hevur síðani kannað alla tilgongdina nærri og lagt seg eftir at tillaga stýringarnar, ið ávirka búningartilgongdina, umframt at seta í verk skipaða frásortering av geldfiski í mai – juli. Hetta arbeiðið er gjørt í tøttum samstarvi við SalmoBreed.

Í sama viðfangi, sum búningarsorteringin var stovnsett, skipaði Fiskaaling í samstarvi við Bakkafrost fyri tøku og sølu av geldfiski og øðrum frásorteraðum fiski. Seld vóru umleið 18 tons, við einum vinningi á 420.000kr. Hetta er annars tilfeingi, ið fyrr er farið burtur.

Framleiðslan verður býtt sundur í trý høvuðsumfør, tíðliga framleiðslu, har fiskurin er ljósstýrdur at geva tíðliga. Vanliga framleiðslu, har fiskurin fylgir náttúrliga ljósinum, og seinframleiðslu, har ljósstýring eisini verður nýtt. Umframt hetta verða aðrir mátar eisini nýttir at stýra gongdini, eitt nú tíðspunktið, tá fiskurin fer í feskvatn og hitastýringar í tí sambandi.

Í 2015 gekst væl betri við búningini. Stýringarnar eru helst ein høvuðsorsøk, og sjálvur genetikkurin hevur møguliga eisini týdning. Í 2014 var strúkifiskurin frá Bolaks støðini og í 2015 alistøðini hjá Sjøtroll. Báðar eru partar av SalmoBreed samtakinum, men mátarnir ymsir á lokalitetunum har.

Strúkingin byrjaði fyrst í september og helt skipað áframm til fyrst í februar. Væl kom undan. Við ársenda 2015 vóru umleið 3,3 milliónir rogn veitt úr L-2012 árganginum.

Higartil eru umleið níggju milliónir rogn veitt, og 14 milliónir rogn eru ávegis. Umframt er ein millión yngul, sum verður byrjunarfóðrað. Kundaynskini fyri 2015 og 2016 framleiðsluna eru 16 milliónir, so felagið hevur havt ein yvirframleiðslu í ár.

Tíðligaframleiðslan gav avbjóðingar við rognastøddini. Høvuðsorsøkin er helst, at ljósstýringin ávirkar vøksturin á foreldrafiskinum, men onnur viðurskifti kunnu eisini ávirka. Fiskaaling byggir royndir so hvørt við tíðligaframleiðslu, sum er satsøki hjá felagnum. Vanliga- og seinframleiðslan hava givið størri rogn, og útlitini fyri góðum veitingum av tí, sum er á goymslu, eru góð.

Øll alivinnan vil hava QTL/IPN-rogn. Hetta eru rogn, ið eru serliga sterk mótvegis IPN. Hetta verður gjørt við, at rognini verða gitin við sili frá serliga útvaldum QTL/IPN fiski.

Felagið hevur innført skipan, har fiskurin nú verður kynsorteraður, og har QTL/IPN hannar vera funnir, meðan fiskurin enn er lítil við Áir. Hetta sparir rakstrarkostnað og plássið verður betri gagnnýtt. Betri vøkstur er ein av væntaðu fyrimununum av hesum. Mannagongdirnar rigga nú, soleiðis at eingin handfaring verður av størra fiskinum í Skopun, annað enn vanlig røkt og flytingar millum hallir so hvørt, fiskurin veksur.





# Granskingarvirksemið á Fiskaaling

Ein stórur partur av virkseminum hjá Fiskaaling er gransking. Granskað verður á fleiri økjum. Eitt nú í lús, rognkelsum, aliumhvørvinum og nýggjum vinnuvegum. Stórur dentur verður lagdur á at granska í evnum sum sampakka við avbjóðingarnar hjá vinnuni

Umstøðurnar til at fremja verkætlanir á sjónum eru munandi styrktar við keypi av stálbáti, sum hevur fingið navnið "Andrias Reinert" eftir fyrsta stjóranum í felagnum.

Fiskaaling leggur dent á at menna vitan og tøkni til at ala á streymasjógvi og meira harðbalnum økjum. Fokus er á streym og aldu á verandi alifirðum og nýggjum økjum.

T.d. kann nevnast, at mátingar eru framdar á Hvalbiarfirði, út fyri Oknadal, á Víkum, í Svínoyarfirði, á Gulanum, í Hestfirði, á Vági, Hovi, í Haraldssundi og í Sundalagnum. Mátingar eru eisini gjørdar á aliútgerð á Sandsvág og á Miðvági. Mátingarnar á Miðvági vóru tengdar at videoupptøkum og mátingum av atferð hjá laksi í nógvari aldu.

Fiskaaling heldur áfram at menna mannagongdir til at máta nøgdirnar og útbreiðsluna av lús í teimum fyrstu stigunum í sjónum og at máta hvussu stór framleiðslan av lúsayngli er í einum alibrúki. Eisini verður arbeitt við hagfrøðiligari greining av lúsatølunum, ið eru frá regluligu lúsateljingunum.

Kanningar av atferð hjá rognkelsum í kørum á landi og í aliringum halda fram. Fokus er á trivnaðin, sodning og at kanna, í hvønn mun rognkelsini eta lús. Mannagongdir til at ala rognkelsi eru mentar og umleið 180.000 rognkelsi frá royndarframleiðsluni eru latin vinnuni. Eisini verður arbeitt við evnafrøðiligum avlúsingarhættum.

Vegna Umhvøvisstovuna eru gjørdar eftirmetingar av árligu botnkanningunum á nøkrum av alifirðunum, har tað serliga er hugt at møguligum broytingum í umhvørvistølunum.

Royndir at ala tara í umhvørvum við ymsum streym– og alduviðurskiftum eru framdar, og kannað er hvussu ymisk viðurskifti og árstíðirnar ávirka góðskuna av alda taranum.

Ein háttur at áseta kyn hjá yngli er mentur, og eru longu umleið 30.000 kynskanningar gjørdar av lívfiskinum. Hetta hevur stóran týdning fyri rognaframleiðsluna orsakað av avmarkaða kapasitetinum á lívfiskastøðini í Skopun

Altjóða samstarv og vegleiðing av lesandi við hægri lærustovnar er ein týðandi partur av virkseminum. Í 2015 vórðu 5 greinar almannakunngjørdar í altjóða vísindatíðarritum, og ein góðtikin til almannakunngeringar, meðan 3 greinar við ársenda vóru inni til metingar. Eisini varð ein PhD-ritgerð vard og tvær masterritgerðir við ávikavist Keypmannahavnar Universitet og Dansk Teknisk Universitet vórðu vardar við sera góðum úrslitum. Harumframt hava tveir BSc studentar frá Unversity College of Bremerhaven og ein nýklaktur djóralækni frá Keypmannahavnar Universiteti fingið sína vegleiðing á Fiskaaling.

# Framtíðarætlanir

Saman við granskingarætlanum er nýmótansgerð ein týðandi partur av framtíðarætlanunum hjá Fiskaaling. Vunnið er á mest átrokandi avbjóðingum, sum hava tyngt virksemið hjá felagnum eina tíð. Framtíðarætlanir, sum hava við sær týðandi dagføringar á støðunum hjá Fiskaaling bæði við Áir og í Skopun, eru ávegis og skulu staðfestast endaliga

Fiskaaling hevur skapt eitt altjóða granskingarumhvørvi, sum við gransking og menning víðkar vitanarstøðið við tí endamáli at økja enn meira um dygdina í alingini.

Fiskaaling leggur dent á altjóða samstarv og hevur gjørt avtalur við granskingarfeløg og universitet um einstakar verkætlanir.

Tað hevur alstóran týdning fyri menningina av felagnum og fyri úrslitið, sum skal koma alarum og samfelagnum til góðar, at hava eina góða kjarnu av starvsfólki á øllum trimum deildunum, sum hava góðar møguleikar at vera ment innan teirra arbeiðsøki. Eisini er tað umráðandi at leggja orku í at fáa lesandi at gera høvuðsuppgávur fyri Fiskaaling fyri at tryggja javna tilgongd av fólki við hægri útbúgving til felagið og vinnuna sum heild.

Felagið fer eftir ætlan at gera neyðugar íløgur í útgerð við Áir og í Skopun til reinsing av inntaksvatni og fyri at innrætta betri og nútímansgera framleiðslukervið sum heild.

Framleiðsla av rognum og yngli í heimsflokki krevur bestu útgerðina og innrættingina. Støða skal endaliga takast til, hvussu besta gagnið fæst úr Sjódeplinum í Nesvík í framtíðini. Felagið fer framhaldandi at seta fokus á gransking, menning og ráðgeving.

Vinnuligi parturin av felagnum er øktur nógv seinastu árini. Væntandi heldur hendan gongdin fram. Avbjóðingar vóru í 2014, men nú eru tiltøk sett í verk, sum hava eydnast væl. Tað hevur ikki verið trupulleiki at nøkta eftirspurningin eftir rognum, men potentialið fyri vørumenning og at økja um neyvleikan í veitingartíðspunktum er eyðsæð. Ætlanirnar at dagføra framleiðslukervið eru fyri at fáa einari tryggari og betri framleiðslu sum heild í framtíðini. Eftirspurningurin eftir rognum frá felagnum fer væntandi at økjast komandi árini, umframt at eftirspurningurin eftir tænastum alsamt økist.